# Kurvabóltssamband Føroya

# Tórshavn

(V-tal: 632287)

# Ársfrásøgn

# 2023

Ársfrásøgnin er framløgd og góðkend á aðalfundi tann 6. oktobur 2024

John Norðbúð Thomsen,
fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um felagið ........ 1
Leiðsluátekning ........ 2
Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara ........ 3
Nýttur roknskaparháttur ........ 5
Rakstrarroknskapur ........ 7
Fíggjarstøða - Ogn ........ 8
Fíggjarstøða - Skyldur ........ 9
Notur ........ 10

# Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Kurvabóltssamband Føroya<br>Tórshavn | |
| | V-tal: | 632287 |
| | Stovningardagur: | 18. november 2017 |
| | Roknskaparbyrjan: | 1. januar |
| | Roknskaparendi: | 31. desember |
| **Nevnd** | John Norðbúð Thomsen, formaður<br>Magnus Jakobsen<br>Anna Jakobsen<br>Sølvi Olsen á Skúr<br>Sára Isfeldt | |
| **Grannskoðari** | Grannskoðarastovan Sp/f<br>skrásett grannskoðanarvirki<br>Heiðavegur 31<br>600 Saltangará | |
| | Telefon: | +298 59 16 16 |
| | T-postur: | gs@gs.fo |
| | Heimasíða: | www.gs.fo |
| **Tekningarreglur** | Felagið verður teknað av í minstalagið tveimum nevndarlimum. Til keyp, sølu ella veðseting av føstum ognum krevst bæði nevndar- og aðalundarsamtykt. | |

## Leiðsluátekning

Leiðsla felagsins hevur í dag viðgjørt og endaliga góðkent ársfrásøgnina fyri 2023 hjá Kurvabóltssamband Føroya.
Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini.
Ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum, fíggjarstøðu og úrslitinum hjá felagnum.
Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 6. oktobur 2024.

**Nevnd:**

John Norðbúð Thomsen, formaður

Magnus Jakobsen

Anna Jakobsen

Sølvi Olsen á Skúr

Sára Isfeldt

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

**Til kapitaleigararnar í Kurvabóltssamband Føroya**

**Niðurstøða**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Kurvabóltssamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar 2023 til 31. desember 2023 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum, íroknað nýttum roknskaparhátti. Ársroknskapurin er gjørdur samsvarandi ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember 2023 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar 2023 til 31. desember 2023 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag undir niðurstøðuni**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir fyri grannskoðan og aðrar ásetingar í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er neyvari útgreinað í brotinum niðanfyri "Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisk krøv fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum, og hava fylgt etisku skyldunum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Okkara fatan er, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir krevst fyri, at ársroknskapurin kann verða gjørdur uttan týðandi skeivleikar, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, er tað ábyrgd leiðslunnar at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og, har tað hevur týdning, at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, at gera ársroknskapin eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella, at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella av mistøkum og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan, og ásetingunum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um teir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at vera týðandi, um sannlíkindi eru fyri, at tey hvør sær ella saman ávirka tær fíggjarligu støðutakanir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiði, sum hesir váðar krevja, og fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru neyðug og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, ikki verða avdúkaðir, er hægri enn týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villeiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa innlit í innanhýsis eftirlitið, sum hevur týdning fyri grannskoðanina fyri at leggja tær grannskoðanaratgerðir til rættis, sum eru nøktandi til umstøðurnar, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitum.

- Taka støðu til, um tann roknskaparháttur sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar og viðheftu upplýsingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Taka støðu til, um tað er rímiligt, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa í sambandi við atgerðir og viðurskifti, sum kunnu hava við sær týðandi óvissu, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit vísa á hesi viðurskifti í ársroknskapinum í niðurstøðu okkara ella, um hesar ávísingarnar ikki eru nóg mikið tillaga okkara niðurstøðu. Niðurstøður okkara byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar í framtíðini ella onnur viðurskiftir kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Taka støðu til ta samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, eisini upplýsingarnar í notunum, og um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at ein rættvísandi mynd fæst.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eyleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

Saltangará, tann 6. oktobur 2024

**Grannskoðarastovan Sp/f**
skrásett grannskoðanarvirki

Mark T. Højgaard
skrásettur grannskoðari

## Nýttur roknskaparháttur

### Alment

Ársfrásøgnin er gjørd eftir ásetingunum í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki B, við neyðugum tillagingum, av tí at talan er um eitt kurvabóltssamband. Roknskaparhátturin er óbroyttur frá í fjør.

Ársfrásøgnin verður gjørd í donskum krónum (DKK). Allar upphæddir í ársfrásøgnin verða avrundaðar til heil tøl og tí kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Inntøkur verða rakstrarførdar so hvørt, sum tær verða vunnar. Sama er við virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Allur kostnaður, ið hoyrir árinum til, við tíðaravmarkingum svarandi til roknskaparárið, verður rakstrarførdur við av- og niðurskrivingum, avsettum skyldum og afturføringum frá broyttum roknskaparligum metingum, ið áður eru innroknaðar í roknskapin.

Ognir og skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum tilgóðar, og virðið á ognunum og skyldunum kann metast álítandi. Ognir og skyldur verða fyrstu ferð tiknar við til útveganarvirðið, og eftir tað verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum gjøllari lýst niðanfyri.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til afturgjaldingar (amortiserað) útveganarvirði, tá ið føst effektiv renta verður roknað yvir tíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður uppgjørt sum uppruna útveganarvirði við frádrátti fyri møguligum avdráttum, eins og til-/frágongd fyri samlaðari amortisering av muninum ímillum útveganarvirði og áljóðandi upphædd.

Tá ið ognir og skyldur verða innroknaðar og virðisásettar, verður lagt upp fyri væntaðum tapi og váða, ið vísir seg, áðrenn ársroknskapurin er liðugur, og sum avsanna ella sanna viðurskifti, ið komu til greinar við ársfrásagnarframløgu.

Roknskaparliga virðið á im- og materiellu støðisognunum verður gjøgnumgingið árliga, fyri at gera av, um ábendingar eru um virðisminking út um vanligu avskrivingina. Um so er, verður støðisognin niðurskrivað til tað lægra av endurútveganarvirðinum.

### Rakstrarroknskapurin

**Nettosøla**

Nettosøla er øll rakstrarførd søla í árinum av handils-, liðugtvørum og tænastum, tá ið keyparin hevur yvirtikið váðan fyri roknskaparlok. Nettosølan er uttan meirvirðisgjald, avgjøld og við frádrátti fyri avsláttrum. Inntøkur frá tænastuveitingum verða rakstrarførdar so hvørt, sum veitingin fer fram.

**Rakstrarkostnaður**

Allur rakstrarkostnaður til høvuðsrakstur felagsins, ið hoyrir árinum til, við tíðar-avmarkingum, verður rakstrarførdur svarandi til rakstrarárið.

Vørunýtsla er kostnaðir at keypa rávurur og hjálpitilfar, frádrigið avsláttur og goymslubroytingar í árinum.

Annar uttanhýsis kostnaður er kostnaður í árinum til útbreiðslu, sølu, marknaðarføring, umsiting, fyrisiting, leigu, tap/vinning søla støðisogn, tap áogn og íverksett langtíðarleiga (leasingkosntaður).

**Fíggjarpostar**

Fíggjarligar inntøkur og kostnaður, ið hoyrir árinum til, við tíðaravmarkingum, verður rakstrarført svarandi til rakstrarárið. Fíggjarpostar eru rentuinntøkur og rentukostnaður.

Eisini rentur frá fíggjarligari leasing og virðisbrævahandli. Ásannað og óásannað kurstap og kursvinningur frá virðisbrøvum, skuld og handli í fremmandum gjaldoyra og amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum eru íroknað.

### Fíggjarstøða

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur er kassa- og innlánspeningur.

Langfreistað skuld verður tikin við til kostprís við lántøku, svarandi til útgoldnu peningaupphæddina við frádrátti fyri handilskostnað. Eftir tað verður skuldin tikin við til niðurgoldna virðið, svarandi til restskuldina við roknskaparlok.

## Rakstrarroknskapur

| | Nota | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| **Nettoinntøka** | 2 | **327.247** | **367.200** |
| Landslið | 3 | -538.495 | 0 |
| Útreiðslur Lands- / FM-kappingin | 4 | -75.355 | -14.810 |
| Útreiðslur Steypa- / Grans Prix-kappingin | 5 | 0 | -14.446 |
| Útreiðslur til skeið | 6 | 0 | -52.541 |
| Útreiðslur til venjaraskeið | 7 | -21.681 | -15.841 |
| Felagsútreiðslur | 8 | -31.718 | -53.268 |
| Fyrisitingarkostnaður | 9 | -24.079 | -14.103 |
| **Bruttoúrslit** | | **-364.081** | **202.191** |
| **Rakstrarúrslit** | | **-364.081** | **202.191** |
| Fíggjarligur kostnaður o.t. | | 0 | -1.779 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **-364.081** | **200.412** |
| **Ársúrslit** | | **-364.081** | **200.412** |

## Fíggjarstøða - Ogn

| | Nota | 31-12-23 | 31-12-22 |
|---|---|---|---|
| **Tøkur peningur** | | **95.696** | **459.777** |
| **Ogn í umferð** | | **95.696** | **459.777** |
| **Ogn samantalt** | | **95.696** | **459.777** |

## Fíggjarstøða - Skyldur

| | Nota | 31-12-23 | 31-12-22 |
|---|---|---|---|
| Flutt frá undanfarnum árum | | 95.696 | 459.777 |
| **Eginpeningur** | 10 | **95.696** | **459.777** |
| **Skyldur samantalt** | | **95.696** | **459.777** |

# Notur

| Nota 1 Høvuðsvirksemi | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Endamál felagsins er at menna kurvabólt í Føroyum | | |

| Nota 2 Nettoinntøka | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Landskassastudningur frá ÍSF | 317.378 | 300.000 |
| Luttøkugjald | 1.000 | 0 |
| Aðrir sponsorar | 2.000 | 60.000 |
| Endurgjald fyri heimligtiltøk | 0 | 7.200 |
| Aðrar inntøkur | 6.869 | 0 |
| **Samantalt** | **327.247** | **367.200** |

| Nota 3 Landslið | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Venjarasamsýning | -21.800 | 0 |
| Kostur í Føroyum | -2.978 | 0 |
| Ferðakostnaður til og í útlandinum | -3.099 | 0 |
| Kostur í útlandinum | -120 | 0 |
| Búnar, ol | -100.246 | 0 |
| Leiga av vøllum / hølum. | -1.440 | 0 |
| Annað | -408.811 | 0 |
| **Samantalt** | **-538.495** | **0** |

| Nota 4 Útreiðslur Lands- / FM-kappingin | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Lønir til dómarar ol | -60.000 | -11.560 |
| Hallarleiga | -5.860 | 0 |
| Uppihald | -416 | 0 |
| Heiðursmerkir | -6.780 | 0 |
| Annað | -2.299 | -3.250 |
| **Samantalt** | **-75.355** | **-14.810** |

| Nota 5 Útreiðslur Steypa- / Grans Prix-kappingin | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Annað | 0 | -14.446 |
| **Samantalt** | **0** | **-14.446** |

**Nota 6 Útreiðslur til skeið**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Løn/samsýnining/kostnaður fyri skeiðshaldara. | 0 | -32.192 |
| Ferðing og koyring | 0 | -14.324 |
| Tilfarð | 0 | -1.190 |
| Leiga av høli | 0 | -2.160 |
| Annað | 0 | -2.675 |
| **Samantalt** | **0** | **-52.541** |

**Nota 7 Útreiðslur til venjaraskeið**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Løn/samsýnining/kostnaður fyri skeiðshaldara. | -1.600 | -10.950 |
| Ferðing og koyring venjaraskeið | -5.538 | -4.537 |
| Tilfarð | 0 | -354 |
| Annað | -14.543 | 0 |
| **Samantalt** | **-21.681** | **-15.841** |

**Nota 8 Felagsútreiðslur**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Útgerð | -17.548 | -52.220 |
| Fundarútreiðslur | -574 | 0 |
| Umboðan | -675 | 0 |
| Gávur og gravering | -5.600 | 0 |
| Heimasíða - lýsingar | -2.684 | -1.048 |
| Annað | -4.638 | 0 |
| **Samantalt** | **-31.718** | **-53.268** |

**Nota 9 Fyrisitingarkostnaður**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Tól, teldur oa | -9.834 | 0 |
| Grannskoðan | -13.322 | -13.125 |
| Aðrar útreiðslur | -924 | -978 |
| **Samantalt** | **-24.079** | **-14.103** |

**Nota 10 Eginpeningur**

| | 31-12-23 | 31-12-22 |
|---|---|---|
| Flutt úrslit primo | 459.777 | 259.365 |
| Flutt úrslit í árinum | -364.081 | 200.412 |
| **Flutt úrslit ultimo** | **95.696** | **459.777** |
| **Eginpeningur samantalt** | **95.696** | **459.777** |

Grannskoðara
stovan

Heiðavegur 31 600 Saltangará

59 16 16
gs@gs.fo
gs.fo